# Teir vaska hendur

**Føroya Arbeiðsgevarafelag langar í skrivi út eftir politikarum og øðrum, sum leggja leiðsluna í Føroya Fiskavirking undir at hava skuldina av vánaligu gongdini í Suðuroy. Teir vaska egnar hendur, sigur stjórin í Vinnuhúsinum**

ÁTALA

*Edvard Joensen*



*Politikarar og onnur, sum leggjast eftir leiðslunum i Føroya Fiskavirking og Framtaksgrunninum, vaska hendur sínar í egnari ómegd, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum*

Politikarar í Suðuroy vaska hendur saman við øðrum, sum áttu, men ikki megna at gera nakað álvarsligt við vinnuligu støðuna í oynni. Tað er ov langt úti baraat leggja alla ábyrgd á leiðsluni í Føroya Fiskavirking og Framtaksgrunninum, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

Í skrivi á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum finst stjórin harðliga at teimum, sum tykjast halda fremstu loysnina upp á trupulleikarnar i Suðuroy vera, at leiðslan í Føroya Fiskavirking og Framtaksgrunninum legjga fá sær.

–Tað er bara tekin um ómegd at halda, at tað er tað einasta, sum skal bjarga vinnuni í oynni, heldur Jan Mortensen.

Hann vísir á, at her er talan um ein heilan landspart, sum er í kreppu, og tað má loysast frá grundini av og ikki bara við at hunddálka eina virkisleiðslu.

Jan Mortensen vísir á, at eitt, sum kundi hjálpt væl upp á støðuna, var um undistøðukervið, infrastrukturin, varð betraður. Betri ferðasamband við meginøkið hevði hjálpt munandi hjá virkjunum í Suðuroy. Bæði tá talan er um at fáa rávøru til og lidna vøru frá virkjunum. Men trupulleikin er so stórur og stingur so djúpt, at tað skal heilt nógv meira til enn tað, sum vit higartil hava verið vitni til, at fáa bjarga økinum, sigur sjórin í Vinnuhsuinum.

Hann heldur tað vera heilt forkastiligt, at leiðslan í Føroya Fiskavirking skal vera gjørd til syndabukk, bara tí leiðslan hevur gjørt tað, hon er sett til. Nevniliga at reka fyritøkuna soleiðis, at hon vinnur pengar.Tað er ikki uppgávan há eini einstakari virkisleiðslu at halda lív í einum heilum landsluti. Tað hava vit politikarar til. Men teir hava ikki greitt sínar skyldur, og tí er tað forkastiligt, at teir nú leggjast eftir leiðsluni í Føroya Fiskavirking og Framtaksgrunninum og vilja hava tær avhøvdaðar, sum um tað var loysnin upp á allar heimsins trupulleikar.

Tað eru so nógvir faktorar, sum hava gjørt sítt til, at tað endaði, sum tað gjørdi. Eitt nú, at fiskavirkini í Suðuroy vóru rímiliga spesialiserað. Til dømis hevði okkurt teirra lagt seg eftir at arbeiða feskan kongafisk mestsum burturav. Og tað var ikki gott, tá djúpvatantrolararnir fingu kvotur, vísir Jan Mortensen á.

– Tað er trupult at finna eina endaliga loysn á støðuni, men tað skal nógv meira til enn bara avhøvding av tveimum nevndum, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

# Sjálvgjørdir syndabukkar

**Leiðslan í Føroya Fiskavirking hevur gjørt seg sjálva til syndabukk og hevur ikki fyri neyðini at fáa hjálp frá øðrum til tess, sigur Henrik Old, løgtingsmðaur, sum heldur uppá, at tann stóri syndarin í Suðuroy júst er leiðslan í Føroya Fiskavirking, sum noktar fyri at lata virksemi koma aftur á Polarfrost**

KREPPA

*Edvard Joensen*

Henrik Old, løgtingsmðaur Javnaðarfloksins í Suðuroy, heldur fast um, at tað eru leiðslurnar í Framtaksgrunninum og Føroya Fiskavirking, sum eru teir stóru syndararnir í Suðuroy. Tá tey kunnu loyva sær at nokta, at virksemi aftur verður á Polarfrost, er tíð at skifta út, sigur hann.

Hann er rúkandi ósamdur við stjóranum í Vinnuhúsinum, sum leggur millum onnur politikararnar undir at hava skuldina av verandi støðu og gera leiðsluna í Føroya Fiskavirking til syndabukk.

–Tað er ikki neyðugt, sigur Henrik Old, tí tað er sjálvgjørt. Tað er púra óhoyrt og ørt at seta sum treyt, at eingin stertur av Føroyagrunninum má arbeiðast á stóra virkinum, sum stendur steindeytt og blokerar stóran part av havnarlagnum í Vági.

Hann vísir á, at tá eitt alivirki herfyri leigaði seg inn á Polarfrost og stóð og manglaði laks at arbeiða, varð biðið um loyvi at sleppa at arbeiða nakað av teirri hýsuni, sum fer heil av landinum. Men svarið var kortanei, tí tað var treyt frá eigarunum, sum er Føroya Fiskavirking, at eingin fiskur av Føroyagrunninum skal arbeiðast á Polarfrost fyri ikki at kappast við onnur virki hjá felagnum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur als ikki skilt sína uppgávu, tá felagið ikki fyri langari tíð síðan hevur sligið nevan í borðið og kravt, at virkið í Vági verður latið øðrum, tá Føroya Fiskavirking ikki megnar at hava tað opið, sigur Henrik Old.

–Leiðslan í Føroya Arbeiðsgevarafelag má so avgjørt ahva hildið jólafrí í Norður Korea, tí tað er bara á slíkum støðum, at slík hugsan kann góðtakast, at eitt alment monopol hevur virki standandi við teirri einastu treyt, at tey ikki mugu brúkast til arbeiðis, sigur hann.

Tað er skammiligt, at Føroya Arbeiðsgevarafelag fer upp í hatta kórið, sum syngur tann sang, at virkini ikki mugu brúkast til arbeiðspláss.

–Tað er skeiv adressa, tá stjórin i Vinnuhúsinum leggur eftir politikarunum, tí tað er leiðslan í Føroya Fiskavirking, sum blokerar fyri arbeiði á Polarfrost, staðfestir Henrik Old. Eg nokti fyri at trúgva, at Føroya Arbeiðsgevarafelag er so avsporað, at felagið tvíheldur um eitt alment monopol, sum stendur fyri slíkum. Arbeiðsgevararnir eiga hinvegin at krevja av Føroya Fiskavirking, at vinnutólini koma til nyttu. Alt annað er hyklarí, sigur Henrik Old, løgtingsmaður.



*Glepsið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur skeiva adressu, sigur Henrik Old, løgtingsmaður. Felagið skuldi heldur tikið í nakkan á leiðsluni fyri Føroya Fiskavirking og syrgt fyri, at Føroya Fiskavirking lat onnur sleppa fram at stóra og væl útgjørda virkinum í Vági, so gongd kom aftur á framleiðsluna har. Alt annað er hyklarí, sigur hann*